Atlantsflog:

# Beinleiðis úr Billund til Íslands

**Flúgvingin hjá Atlantsflog hevur nú vundið so nógv uppá seg, at túratalið má økjast munandi komandi ár. Boðað er longu frá fleiri eykatúrum til Billunds**

FLOGFERÐSLA
*Snorri Brend*



*Atlantsflog brynjar seg enn meiri út og fer nú undir flúgving millum Billund og Ísland komandi summar*

Flúgvingin hjá Atlantsflog hevur nú vundið so nógv uppá seg, at túratalið má økjast munandi komandi ár. Boðað er longu frá fleiri eykatúrum til Billunds.

Komandi summar er ætlanin at flúgva ikki færri enn 9 ferðir millum billund og Vágarnar.

Men ynskið hjá Atlantsflogi er eisini at geva hesum fólkunum ein møguleika at flúgva víðari til Íslands í sama viðfangi. Og hesin møguleikin verður veruliga tøkur komandi summar.

- Eitt lætt og einfalt skifti á teimum vøkru oyggjunum, er herrópið til hesa nýggju rutuna, sum hevur mangar spennandi og positivar fylgjur við sær.

Fyrr í vikuni kom fram, at Atlantsflog ætlar at koma fram við nøkrum serliga góðum prísum á nýggju rutuni millum Billund og Reykjavík.

Fyrimunurin við at flúgva til Reykjavíkar er, at ein so sleppur undan koyringini úr Keflavík og til Reykjavík.

Hetland:

# Ynskir tættari samband við føroyska skúlan

**Í hesi vikuni er eitt umboð fyri Shetland College til Føroyar. Her fer Maggie Marr m.a. at kunna um møguleikarnar á hesum skúlanum. Hon ynskir haraftrat at fáa samstarv í lag við føroyskar skúlamyndugleikar**

SKÚLI
*Snorri Brend*

Maggie Marr skal á Føroya-ferðini luttaka á ráðstevnuni "Snið og handverk í heimligum og altjóða høpi" sum verður í Norðurlandahúsinum í dag. Her fer hon at greiða nærri frá teim møguleikum, sum kreativir føroyingar hava á skúlanum, har hon starvast.

Í løtuni gongur ein danskur næmingur á skúlanum, men Maggie vil fegin hava føroyskar næmingar á skúlan.

Í hesum døgum hendir so nógv innan ta kreativa økið í Føroyum, og nógvir føroyingar leita sær til Danmarkar, Onglands og aðrastaðir fyri at fáa sær útbúgving innan hesa vinnuna.

- Hví ikki koma til Hetlands? Her eru eisini nógvir møguleikar, sigur Maggie Marr.

Løgmaður Jóannes Eidesgaard er júst afturkomin av ferð í Suðuroyggjum, og er tí líkt til at eitt økt samstarv kann verða millum okkum og oyggjalondini fyri sunnan.

# Fleiri smærri graslíkisvøllir í Havn

**Tórshavnar kommuna ætlar at gera fleiri smærri vøllir ymsa staðni í Havn. Í dag er bert tann eini – á Hamrinum á Argjum – men komandi ár gerast teir munandi fleiri.**

BÓLTSPÆL
*Snorri Brend*

**Havn:** Henda ætlanin er ein partur av teirri sonevndu "Sparkivallarætlanini" hjá Fótbóltssambandinum har stuðul kann fáast til smærri bóltvøllir.

Kommunan hevur fingið fleiri áheitanir og ítøkiligar umsóknir frá eigarafeløgum og áhugabólkum um slíkar vallir ymsa staðni í býnum – í Folagerði, á Teigum, úr Líðunum úti í Grønlandi, Millum Gilja, Fjalsgøtu, Hvítanesi, Signabø og Mækjugøtu.

Eitt yvirlit yvir øll hesi støðini er nú gjørt, og skal nú arbeiðast eftir hesum, soleiðis at helst eini 10 slíkir vallir kunnu verða gjørdir hetta komandi árið.

Hetta fer at kosta kommununi 2,6 mió. kr. komandi ár, sum hóast alt er munandi bíligari enn um gjørt skuldi verið sum frammanundan, har ein einstakur vøllur kostaði um 600.000 kr. Støðan er nevniliga hon, at kommunan ætlar at skifta graslíkið á niðara vølli í Gundadali. Í hesum sambandi er møguleiki at endurnýta hetta graslíkið og leggja tað á smærri bóltvallir kring allan býin – til stóra gleði fyri fótbóltshugaðu børnini í býnum.

# Luksusbarnagarðar kunnu lata upp í Danmark

**Bæði danska Kommunufelagið og familjuráðharrin Lars Barfoed úr Vinstra eru sinnaði fyri eini royndarskipan við sonevndum luksusbarnagørðum. Her hava foreldur møguleika at keypa eyka upplivingar til barnagarðs- ella vøggustovubørn síni, soleiðis at góðskan í dagstovnunum hækkar, skrivar Berlingske Tidende.**

DAGSTOVNAR
*Snorri Brend*

Uppskotið um at kunna keypa eyka upplivingar til børnini er sett fram av konservativa borgarstjóranum í Gentofte, Hans Toft.

- Øll foreldur ynskja góðsku, og tey vilja fegin gjalda fyri hana. Tað kann t.d. vera ein pedagogur hvørs sergrein er list, og sum kemur í barnagarðin at undirvísa. Tað kann eisini vera ein náttúruvegleiðari, sum tekur børnini við sær í skógin, ella ein handverkari, sum børnini kunnu byggja okkurt saman við.

- Foreldur hava so nógv um at vera um dagin. Og tað er hóast alt í dagtímunum, meðan børnini eru á stovnunum, at tey eru nóg frísk til at taka ímóti spennandi upplivingum. So hví ikki geva teimum loyvi til tað?!, spyr borgarstjórin í Gentofte.

Hann vísir eisini til, at foreldur í dag ikki hava loyvi ti lat fíggja serstøk initiativ í hesum sambandi.

## Fornfrøðilig kanning Úti í Toft í Vestmanna

TÍÐINDASKRIV

Í døgunum 12.-16. september hevur Fornminnissavnið gjørt fornfrøðiliga kanning Úti í Toft í Vestmanna.

Staðurin, talan er um, liggur í gomlum bø, nakað uttari enn sjálvur býlingurin á Rógvu ger í dag. Á staðnum sæst lágur heyggur. Sagt hevur verið, at har skuldu tey elstu Rógvuhúsini standa.

Longu í 2003, tá tað kom fram, at ætlanir vóru at gera dagtilhald fyri uppilagstar sjómenn niðan fyri nýggja kirkjugarð, fór savnið undir at kanna hvørjar ítøkiligu ætlanirnar vóru. Tað var áhugabólkur, ið varð farin undir ætlanirnar um eitt sambýli og dagtilhald; men seinni hevði eisini Vestmanna kommuna víst lendinum har áhuga. Lendið er slætt og rættiliga vítt, og vælegnað sum byggilendið. Kommunan var tí farin undir at kanna møguleikar fyri at byggja eitt røktarheim beint við, soleiðis at hesar verkætlanirnar kundu verða tengdar hvør at aðrari. Og tað er júst har, møguligu bústaðaleivdirnar Úti í Toft liggja.

Fornminnissavnið gjørdi tí vart við, at slíkar bústaðaleivdir eru umfataðar av fornminnafriðingarlógini. Varð hildið fast við byggiætlanirnar, var greitt, at neyðugt fór at verða at loysa tær úr friðing. Hetta verður vanliga gjørt við at lata bústaðaleivdirnar kanna. Tað vil siga, at í fyrstu syftu fór at verða gjørd ein forkanning, ið skuldi geva ábending um, hvussu umfatandi og av hvørjum slagi møguligu bústaðaleivdirnar eru. Grundað á forkanningina fór ein fornfrøðilig rannsókn at verða løgd til rættis — eisini við tíðar- og kostnaðarætlan. Útreiðslur í samabnd við forkanning og rannsókn ber arbeiðstakarin.

Sum nevnt er skilligur heyggur í lendinum, um 20x10 m til víddar. Sagt er frá, at tá Hans Jákup Thomsen, bóndi (f. 1889), velti har, gavst hann, tí illa bar til at velta vegna grót, og tí at hann sá, at har var okkurt serligt.

Grundað á upplýsingar og tað ið sæst í lendinum var tí lítið at ivast í, at í heygnum kundu fjala seg fornar bústaðaleivdir. Hetta fekst tó ikki vissa fyri uttan at sett varð á.

Í samstavi við Vestmanna kommunu, varð tískil sett í verk forkanning. Grivnar eru tvær veitir tvørtur um sjónliga heyggin. Ætlanin var at arbeiða í tvær vikur, men kanningin hevur longu staðfest, at bústaðaleivdir eru fjaldar í heygnum Úti í Toft. Tað verður mett, at vit sum er hava nóg mikið av upplýsingum til at avgera, at neyðugt verður við fornfrøðiligari rannsókn av lendinum. Líkt er til, at bústaðarøkið er avmarkað til sjálvan heyggin, men er hetta spurningur, ið má kannast neyvari. Av tí at tað bert varð grivið niður á bústaðaleivdirnar og ikki ígjøgnum tær, eru eingir lutir funnir, ið kunnu siga nakað um hvat slag av búseting her kann hava verið ella tíðarfestingina av henni.

Hinvegin, við at samanbera staðin Úti í Toft við staðir aðra staðir í landinum, har smærri miðaldarligir bústaðir eru funnir í gomlum bø — eitt nú í Eingjartoftum og Innanfyri Heygagerði í Sandavági — er ikki óhugsandi, at tað í hesum føri er talan um bústað av sama slagi. Kann sostatt vera, at fólk eru flutt úr fyrndarbýlinginum á Rógvu og hagar út heldur enn hinvegin, soleiðis sum frásøgn er um.

Forkanningin er at enda komin. Nú verður so lagt upp til kommununa at skipa fyri fígging av eini rannsókn í samstarvi við Fornminnissavnið. Við eini fornfrøðiligari rannsókn hevði helst borið til at fingið staðfest, hvussu bústaðaleivdirnar Úti i Toft eiga at verða fataðar í búsetingarsøguliga høpinum í Vestmanna sum heild. Livst so spyrst.